## Ingibjørg er navnið

Tórshavnar býráð avgjørdi í gjárkvøldið, at navnið á síðugøtuni vestureftir við Karlamagnusarbreyt, skal verða Ingibjargargøta.

Gøtunavnanevndin vísir til Aligastrímu, 6. ørindi:

*Karlamagnus Pippingsson*
*Ingibjargar barnið*
*bæði gleðir hann úlv og ørn*
*í blóði hirðir hann jarnið*

Ingibjørg er sostatt móðir Karlamagnus, og tískil eitt sera hóskandi navn. At gøtan fekk nýtt navn merkir, at nýtast kann vanlig vinstra og høgra talmerking.

Býráðið samtykti einmælt tilmælið.

# Dánjal 25 ára starvsdag

Í dag, 1. mai, eru liðin 25 ár síðani Dánjal Húsgarð á fyrsta sinni fór umborð eitt strandferðsluskip at arbeiða. Hetta var gamla Ternan, sum røkti farleiðina úr Havnini inn á Skálafjørðin. At byrja við røkti hann starvið sum slaktari samstundis sum hann sigldi við gomlu Ternu, men tá hann í 1992 varð biðin um at gerast skipari, bar ikki longur til at røkja starvið sum slaktari eisini. Tá gamla Terna seinni varð løgd fór Dánjal Húsgarð umborð á Rituna, har hann seinnu árini hevur siglt sum stýrimaður og skipari. Dánjal er annars væl kendur sum bæði slaktari og ikki minst fimleikari. Meiri verður at lesa um Dánjal í blaðnum mánadagin.




*Gutti Jacobsen, skipari á Rituni, handar Dánjal Húsgarð blómutyssi í sambandi við 25 ára starvsdagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*


RÁÐSTEVNA

## Kilowatt, Krónur og Koltvísúrni

Ráðstevna um orkusparing í húsum og bygningum

Landsstýriskvinnan í innlendismálum hevur tikið stig til at seta tiltøk í verk til tess at minka um orkunýtslu í almennum bygningum og harvið eisini at minka um CO2-útlátið.

Landsverk er tí farið undir at kanna almennar bygningar og at skráseta møguleikarnar at minka um orkunýtsluna.

Síðani verður farið undir at fremja ítøkilig orkusparandi tiltøk, sum kunnu vera alt frá at skifta og broyta bygningslutir til at broyta nýtsluatburð.

Í hesum sambandi skipar Landsverk fyri ráðstevnu við heitinum Kilowatt, Krónur og Koltvísúrni , sum fer at snúgva seg um orkusparing í húsum og bygningum.

**Ráðstevnan verður í Norðurlandahúsinum 20. mai kl. 09.00**

Ráðstevnan vendir sær til ráðgevarar, byggimeistarar, stovnsleiðarar, húsavørðar og byggimyndugleikar. Á ráðstevnuni verður møguleiki at fáa innlit í hugsanir og vitan hjá serfrøðingum.

### Skrá fyri dagin

| | |
|---|---|
| Kl. 09:00 | Skráseting og morgunkaffi |
| Kl. 09.30 | Ráðstevnan verður sett av Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum. |
| Kl. 09.45 | **Bygging og orkunýtsla í Føroyum.** Ole Jensen, arkitektur, Landsverk |
| Kl. 10.15 | **Varandi orka** Jarðfeingi |
| Kl. 10.45 | **Steðgur** |
| Kl. 11.00 | **Orkusparandi tiltøk í verandi bygningum.** Kim Wittchen, senior forsker, Statens Byggeforskningsinstitut – Energi og miljø |
| Kl. 11.45 | **Matarsteðgur** |
| Kl. 13.00 | **Avleiðingar av orkusparandi tiltøkum.** Anna Pia Koch, senior konsulent, Teknologisk Institut – fugt og indeklima. |
| Kl. 13:45 | **Steðgur** |
| Kl. 14.00 | **Orkusparing og/ella byggilist.** Mikael Koch, arkitektur, Danske Arkitekter, ráðgevi innan burðardygga bygging, |
| Kl. 14.45 | **Samandráttur – kjak** |

Ráðstevnan endar umleið kl. 15.30. Fyrilit verða tikin fyri broytingum í skránni.

### Kostnaður og tilmelding

Tilmelding til ráðstevnuna fer fram við at senda ein teldupost til ligr@lv.fo ella við at ringja á tlf. 540 806.

Luttakaragjald er 800 kr. og verður at flyta á konto 128 2206 í Eik banka.

Viðmerkið "Orkuráðstevna".

Freistin at tekna seg er 18. mai 2009, kl. 12.00. Eru spurningar til ráðstevnuna, ber til at venda sær til:

Ole Jensen á 540 875 ella olej@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*



ÚTBJÓÐING

## Vegur gjøgnum Leirvíkar bygd

Við hesum verður arbeiðið viðv. veg gjøgnum Leirvíkar bygd boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:

- gerð av landsvegi gjøgnum Leirvíkar bygd, ca. 1640 m
- tvær rundkoyringar við tilhoyrandi íbindingum
- íbindingar oman á Kráatanga
- tvær brýr
- grótkast / laðing
- dýping av bátahyli
- leiðingar o.a.

Høvuðsarbeiðið skal vera liðugt í seinasta lagi 1. desember 2010.

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegur 5, FO-110 Tórshavn

**hósdagin 4. juni 2009, kl. 14.00.**

**Ástaðarfundur týsdagin 19 mai 2009. , kl. 10.00.**

Møtt verður við kirkjuna í Leirvík

Útbjóðingartilfarið verður bert útflýggjað digitalt og kann bíleggjast frá týsdegnum 5. mai 2009, við at venda sær til:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn
Tel. 340 800
lv@lv.fo

Útbjóðingartilfarið verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr. 5.000, ið verður at flyta á konto nr. 134.228.4 í Eik.

Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina, t.e. 9. juni 2009.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*